Góðu næmingar í 2. flokki og foreldur, Argir 17.11.25

Frá mikudegnum og komandi vikurnar koma børnini í 2. flokki til heilsufrøðing.

Tosað verður við børnini í bólkum og hvør sær.
Í ár fara vit í smærri bólkum at tosa um kroppin (svøvn, rørslu, mat og reinføri)

Børnini koma eisini ein og ein til heilsufrøðingin, har sjón, hædd og vekt verða kannað. Tá verður eisini tosað við barnið um trivnaðin.

Í hesum sambandi hava børnini fingið eitt skjal at útfylla heim við. Vinarliga fylli skjalið út, saman við barninum, koyr skjalið í brævbjálvan og latið tað innaftur til flokslæraran í seinasta lagið fríggjadagin tann 21.11.25.

Ynskja tit at tosa við meg ella hava spurningar, eru tit vælkomin at ringja til mín.
Í aðrar mátar verða tit kontaktað um neyðugt.

Vinarliga
Hervør Jacobsen, heilsufrøðingur
tlf. 562355
hervorj@gigni.fo